

Eydna Skaale · eydnaskaale@hotmail.com

# DÓMSNEVNDIN

## 4 MANNFÓLK OG 2 KONUFÓLK MYNDA DÓMSNEVNDINA TIL PLANET AWARDS 2009. TEY ERU DULNEVND, MEN VIT HAVA FINGIÐ ORÐ Á HØVUÐSDÓMARAN OG HAVA SPURT UM ÁRSINS PLANET HANDAN

Hvørji eru fólkini í dómsnevndini?

– Vit eru 6 fólk, ið eru ógvuliga ymisk. Vit hava øll sera ymiskt tilknýti til tónleikavinnuna, aldursbýtið er breitt, og bæði kynini eru umboðað. Onkur er rocktónleikari og onkur er innan dansitónleik, so vit fevna ógvuliga breitt. Men vit hava øll fingurin á pulsinum og fylgja væl við í øllum, sum hendir.

Tit eru dulnevnd, men vita tit hvørjir hinir limirnir í dómsnevndini eru?

– Ja, allir limirnir í dómsnevndini vita hvørji hini eru. Vit hava samskift ræðuliga nógv seinasta mánaðin og vikuna áðrenn tilnevningarnar vórðu klárar, sendu vit 150 mailar okkara millum. Vit hava eisini diskuterað, brainstormað og biðið hinar limirnar lurtað eftir onkrum, sum vit hildu vera áhugavert.

Hvussu eru tit komin fram til tilnevningarnar?

– Tað byrjaði við einum stórum brainstormi, har vit høvdu eini 30-50 nøvn til hvørja heiðursløn. Vit hava hugt at hvørji fólk hava verið aktuell í ár og hava faktiskt gingið systematiskt gjøgnum alt árið. Vit hava skaffað allar listar yvir útgávur og hugsað um øll tiltøk, ið annars hava verið.

Síðani hevur hvør limur valt 5 nøvn, sum tey vildu hava við á listan, burturúr rúgvuni. Síðani hava vit atkvøtt, og tað hevur alt verið dulnevnt. Vit hava faktiskt atkvøtt umvegis telduna. Eftir fyrstu atkvøðugreiðsluna vóru tað ein rúgva av nøvnum, sum høvdu einar 2-3 atkvøður, og sum vórðu jøvn á 3. til 8. plássi. So atkvøddu vit faktiskt bara umaftur og umaftur, inntil vit komu fram til tann listan, sum nú er kunngjørdur. So tað er demokratiskt má sigast.

Hvørji eru krøvini fyri at verða tilnevnd?

– Krøvini fyri at verða tilnevnd er bara, at fólk hava verið virkin frá 01.12.2008 til 30.11.2009. Talan kann verða um live framførslur, fløguútgávur, air play, sølu, ja, vit hyggja stórt sæð eftir øllum.

Tit hava útvalt tey tilnevndu, men tit hava eisini atkvøðurætt. Hví skal dómsnevndin hava so nógv at siga?

– Dómsnevndin hevur 50% at siga, og sms'ini sum koma inn telja 50%. Tað vísir seg tó ofta, at tað eru sms'ararnir, sum hava seinasta orðið. Men vit hava so nógv at siga, tí landið er so lítið, og tað er skjótt til, at onkur av teimum tilnevndu fær ein skúlaflokk at atkvøða, ella at øll familjan sendir sms inn. Endaliga úrslitið kann skjótt verða manipulerað, tá landið er so lítið, og vit eru so ein trygd fyri, at tað hóast alt kemur eitt sindur an uppá fakligheit innan tónleikin og ikki bert vina- og kenninga politik, sum vit ofta síggja í Føroyum.

Hvussu fær man atkvøtt?

– Aftanfyri øll tey tilnevndu stendur ein koda, sum skal sms'as inn til 1906. Tað kostar 5 kr. Til ber at atkvøða einaferð fyri hvørja tilnevning. Øll, sum atkvøða eru við í dráttinum um góðar vinningar. Eina fartelefon frá Føroya Tele og eina ferð fyri tvey við ungdómstúrinum hjá Norrønu í 2010. Atkvøðast kann bara umvegis sms og altso bara einaferð til hvørja tilnevning.

Hvussu leingi kann man atkvøða?

– Atkvøðugreiðslan steingir 27. desember á middegi. Síðani telur høvuðsdómarin upp, og tað verður gjørt fleiri ferðir, soleiðis, at vit eru púra vís í, at talið er rætt. Alt verður prófført so hvørt, so tað ber ikki til hjá høvuðsdómaranum at snýta og lumpa sær síni yndisnøvn fram um. Síðani verður úrslitið reviderað av einum granskoðara, sum tryggjar, at alt er farið rætt fram.

Hví eru tit dulnevnd?

– Eins og síður er til Planet-handanir, verður dómsnendin almannakunngjørd á sjálvum tiltakinum. Hetta er fyri at tryggja, at fólk ikki fara at ávirka dómsnevndina. Nú eru tey tilnevndu funnin, og nú skulu nøvnini sodna, áðrenn vit geva okkara endaligu atkvøðu. Og hon skal vera púra óheft -uttan ávirkan av hvørki tónleikarum ella fjepparum.